# Barna- og útbúgvingarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | Skrivið her |
| Mál nr.: | Skrivið her |
| Málsviðgjørt: | Skrivið her |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**málskúla fyri føroyskt sum annaðmál**

## Kapittul 1
## Endamál, undirvísing, roynd og próvtøka

**§ 1.** Eftir reglunum í hesi løgtingslóg verður landsumfatandi undirvísing í føroyskum sum annaðmál skipað fyri tilflytarar eldri enn 12 ár.
*Stk. 2.* Undirvísingin hevur til endamáls at menna samskiftisførleikar næmingsins, málsligu førleikar næmingsins og at geva næminginum innlit í mentanarlig og samfelagslig viðurskifti í Føroyum.
Stk 3. Undirvísingin eigur at skapa karmar fyri, at tann einstaki næmingurin framhaldandi kann menna seg málsliga og persónliga. Undir hesum eigur undirvísingin at taka atlit at samleika- og mentanarfatan næmingsins, sum er neyvt tongd at annaðmálslæring.

**§ 2.** Málskúlin undirvísir sambært námsætlan í føroyskum sum annaðmál. Undirvísingin kann enda við roynd ella próvtøku sambært lýstari námsætlan, ið landsstýrismaðurin letur gera.
*Stk. 2.* Málskúlin kann veita styttri grundskeið í føroyskum, og kann Málskúlin veita umbiðin skeið, sum verða heilt ella partvíst fíggjað av tí, sum umbiður skeiðið.
*Stk. 3.* Málskúlin kann eftir áheitan og sambært serstakari játtan ella aðrari fígging skipa fyri øðrum undirvísingar- og útbúgvingarvirksemi, sum verður fyriskipað fyri borgarum, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrstamál.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur viðvíkjandi ásetingunum í stk. 2 og 3, undir hesum um játtan og møguligt luttøkugjald.

**§ 3.** Málskúlastjórin hevur evstu námsfrøðiligu og fakligu ábyrgdina av undirvísingini í føroyskum sum annaðmál sambært hesi lóg.
*Stk. 2.* Málskúlastjórin skipar í góðari tíð undan hvørjari lestrarhálvu eftir tørvi og í

samstarvi við kommunalu málskúlarnar, fyri innskriving, visitatión og undirvísing.

*Stk. 3.* Málskúlastjórin skipar fyri royndum og próvtøkum eftir tørvi hvørja lestrarhálvu og møguliga øðrum próvtøkum. Galdandi námsætlan verður fylgd. Málskúlastjórin skipar fyri visitatión av næmingum, sum fara undir útbúgving í føroyskum sum annaðmál.
*Stk. 4.* Próvstovan útvegar stig- og støðuroyndir og alt neyðugt próvtøkutilfar og visitatiónstilfar sambært galdandi námsætlan og eftir tørvi, sum málskúlastjórin samskipar. Próvstovan kann eisini útvega próvtøkutilfar í sambandi við undirvísing smbrt. § 2 stk. 3.

*Stk.5.* Málskúlastjórin hevur fyrisitingarliga ábyrgd og fíggjarliga ábyrgd av landsumfatandi rakstri málskúlans. Málskúlastjórin vísir til Undirvísingarstýrið.
*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um virki málskúlastjórans um innskriving, visitatión, undirvísing, royndir, sjúkraroynd, endurroynd, umdøming, dispensatión, lestrarvegleiðing, lestrar- og skilhaldsreglur, útbúgvingartíð, setanarviðurskifti hjá starvsfólki, rakstri av málskúlanum annars o.a.

## Kapittul 2
## Skipan

**§ 4.** Fyri at koma undir skipanina í hesi løgtingslóg, skal kommunalur málskúli fyri tilflytarar vera knýttur at eini kommunu ella at einum kommunalum samstarvi, hereftir kommuna.
*Stk. 2.* Kommunali málskúlin skal lúka hesar treytir:

1) Undirvísing skal standa øllum í boði, sum eru fevnd av hesi løgtingslóg.
2) Undirvísingin skal vera skipað sambært hesi løgtingslóg og teimum reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir við heimild í hesi løgtingslóg.
3) Kommunan ella kommunala samstarvið skal seta hóskandi undirvísingarhølir og undirvísingaramboð til taks.

*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin hevur yvirumsjónina við Málskúlanum fyri føroyskt sum annaðmál og teimum kommunalu samstørvunum sambært stk. 1.

## Kapittul 3
## Setanir og førleikakrøv

*Málskúlastjórin*

**§ 5.** Landsstýrismaðurin setir í starv málskúlastjóra at taka sær av yvirskipaðu fakligu, námsfrøðiligu, fíggjarligu og samskipandi uppgávunum fyri undirvísing sambært hesi løgtingslóg.
*Stk. 2.* Málskúlastjórin skal hava útbúgving innan annaðmál og skal antin hava nomið sær, ella fara undir at nema sær, góðkenda leiðsluútbúgving.

*Kommunali málskúlaleiðarin*

**§ 6.** Fyri kommunala málskúlan setir kommunan ella kommunala samstarvið ein kommunalan málskúlaleiðara, sum hevur dagligu leiðsluna og leiðsluna av kommunalu málskúlaskipanini.
*Stk. 2.* Kommunali málskúlaleiðarin kann vera leiðarin av kommunalu kvøldskúlaskipanini.
*Stk. 3.* Kommunali málskúlaleiðarin samskipar saman við málskúlastjóranum leiðreglur viðvíkjandi upptøku, virksemi, undirvísingaramboðum o.ø. í kommunala málskúlanum.

*Lærarar*

**§ 7.** Málskúlastjórin setir og loysir úr starvi lærarar í samráð við kommunala málskúlaleiðaran. Lærarar hava, hvat viðvíkur námsfrøðiliga virkseminum, tilvísing til málskúlastjóran.
*Stk. 2.* Alt landið er at rokna sum eitt setanarøki.

*Stk. 2.* Lærarar í Málskúlanum skulu hava neyðugu fakligu og námsfrøðiligu førleikarnar til at undirvísa í føroyskum sum annaðmál.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um førleikakrøv og útbúgvingarkrøv sambært stk. 2.

**Kapittul 4**
**Fígging**

**§ 8.** Málskúlaskipanin verður fíggjað soleiðis, at landið rindar løn til málskúlastjóra og skrivstovuhald, ferðing, umframt løn til lærarar í Málskúlanum. Málskúlastjórin umsitur og avgreiðir lønir til lærarar í Málskúlanum.
*Stk. 2.* Kommunan lønar kommunala málskúlaleiðaranum og øðrum starvsfólkum, sum kommunan setur í starv við kommunala málskúlan fyri føroyskt sum annaðmál.
*Stk 3.* Landsstýrismaðurin kann veita lønarískoyti til lokalu málskúlaleiðsluna upp til 8% av teirri løn, sum verður útgoldin lærarum á kommunala málskúlanum. Hetta í sambandi við fyriskipan av undirvísing í føroyskum sum annaðmál.

*Stk. 4.* Kommunan ella kommunala samstarvið útvegar kommunalu málskúlunum hóskandi høli og undirvísingaramboð. Um tørvur er á tí, kann kommuna gera avtalu við landsstýrismannin um undirvísingarhøli, sum landið ræður yvir.

**§ 9.** Málskúlin kann krevja gjald fyri undirvísingartilfar (bøkur o.a.), samsvarandi reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir.
Stk 2. Í samstarvi við Málskúlan kann kommunali málskúlin umsita gjaldið fyri undirvísingartilfar, sum nemingarnir skulu gjalda.

**Kapittul 7**
**Ráðgevandi nevnd**

**§ 10.** At vera málskúlastjóranum til hjálpar at samskipa undirvísing í føroyskum sum annaðmál verður skipað ein nevnd. Í nevndini sita kommunalu málskúlaleiðararnir og málskúlastjórin, sum er formaður í nevndini.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir í samráð við kommunurnar nærri reglur fyri virki nevndarinnar.

**Kapittul 8**
**Kærur**
**§ 11.** Fyrisitingarlig avgerð, ið málskúlastjórin hevur tikið, kann kærast til landsstýrismannin. Kærufreistin er 4 vikur eftir, at kærarin hevur móttikið avgerðina. Kæran skal vera skrivlig, og har tað ber til, vera grundgivin.

**§ 12.** Avgerð málskúlastjórans í námsfrøðiligum málum, m.a. viðvíkjandi próvtøkuni, kann, tá ið avgerðin viðvíkir rættarligum spurningum,
kærast til landsstýrismannin. Kærufreistin er 4 vikur eftir, at kærarin hevur móttikið avgerðina. Kæran skal vera skrivlig og, har tað ber til, vera grundgivin.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur viðvíkjandi kærum í námsfrøðiligum málum, undir hesum í hvønn mun og undir hvørjum treytum málskúlastjórin kann bjóða neminginum endurroynd ella umdøming. Landsstýrismaðurin kann somuleiðis áseta, at úrslitið frá endurroyndini ella umdømingini er endaligt.

**Kapittul 9**
**Gildiskoma og skiftisreglur**

**§ 13.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin skal eftir 3 árum, frá tí at løgtingslógin er komin í gildi, leggja fyri Løgtingið frágreiðing um, hvussu lógin hevur roynst, og um hon hevur virkað eftir ætlan.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

Í nógv ár hevur undirvísing í føroyskum sum annaðmál verið fyriskipað innan kommunala geiran og sum frítíðarundirvísing sambært kap. 3 í løgtingslóg um frítíðarundirvísing, (ll. nr. 70 frá 30. juni 1983 sum seinast broytt við ll. nr. 124 frá 10. desember 2003), sum snýr seg um serstaka frítíðarundirvísing. Kap. 7 í løgtingslóg um frítíðarundirvísing heimilar landsstýrismanninum at veita 100 % endurgjald fyri lønarútreiðslur til lærarar, sum undirvísa í eitt nú føroyskum sum annaðmál, men eru tað kommunurnar, ið rinda fyri raksturin av kvøldskúlanum.

Henda skipan hevur virkað væl, og hava tilflytarar kring landið havt møguleika fyri at tekna seg til styttri málskeið, ið hava lagt lunnar undir málsligari og samfelagsligari integratión. Men tann málsliga menningin hevur verið avmarkað, tá ið skeiðini eru stutt og ofta endurtøkur av skeiðum frammanundan.

Í Tórshavnar Kommunu hevur frítíðarundirvísingin síðani 2011 eisini skipað fyri drúgvari málskeiðum – upp til 20 tímar um vikuna í umleið 15 vikur. Og hava málskeiðini verið skipað við møguleika fyri framhaldi.

Í 2020 varð farið undir eina verkætlan at tryggja, at tilflytarar og borgarar kring alt landið, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál, fáa somu møguleikar fyri at ogna sær førleikar í føroyskum máli og mentan og samfelagsviðurskiftum, og at tað verður lagdur dentur á at visitera og eftirmeta næmingarnar, so at støðugur framburður í førleikum verður tryggjaður. Tey tilmæli, sum skiftandi landsstýri hava útvegað um integratiónsviðurskifti, hava øll peikað á, at málslig menning er ein av fleiri fyritreytum fyri væleydnaðari integratión. Tað hevur víst seg, at tørvur er á einum útbúgvingartilboði í føroyskum sum annaðmál. At fyriskipa heilar útbúgvingar krevur meira, enn karmarnir í lógini um frítíðarundirvísing geva møguleika fyri. Tað var høvuðsorsøkin til, at gjørt varð av, at arbeiða miðvíst fram eftir einari skipan, sum kann standa øllum tilflytarum og borgarum í boði, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál, og sum er sambærilig við tey tilboð um málsliga menning, sum standa tilflytarum í boði í okkara grannalondum.

Ein námsætlan fyri føroyskt sum annaðmál fyri vaksin varð gjørd, sum fylgir altjóða CEFR stiganum, og sum tryggjar, at útbúgvingin í øðrum máli í Føroyum er sambærilig við annaðmáls-útbúgvingar í Evropa, og sum tryggjar, at støðugur framburður er í útbúgvingartilgongdini hjá tí einstaka næminginum. Sambært hesari námsætlan verður í samstarvi við Próvstovuna arbeitt við royndum, sum eru fyritreytin fyri at flyta upp á hægri stig í undirvísingini og FSA-útbúgvingini. Eisini eru átøk sett í verk, sum hava til endamáls at útvega hóskandi undirvísingartilfar til føroyskt sum annaðmál. Eins og Fróðskaparsetrið hevur fyriskipað diplomútbúgving fyri lærarum í føroyskum sum annaðmál.

Frá skúlaársbyrjan 2020 til 2023 hevur verið arbeitt sambært námsætlanini í Tórshavn eins og í Suðuroy, síðani 2021 eisini i í Vágunum, og síðani  á heysti 2022 á Kambsdali.

Tórshavnar Kommuna hevur gjørt samstarvsavtalu við kommunurnar í Vágum, og eru tað nú tveir flokkar í Vágum. Í Tórshavnar Kommunu er tørvurin á undirvísing í føroyskum sum annaðmál so nógv vaksin, at tað eru á vári 2023 stovnaðir 6 flokkar fyri vaksin, umframt ein móttøkuflokkur fyri eldri fólkaskúlanæmingar.

Kommunurnar í Suðuroynni hava gjørt samstarvsavtalu um undirvísing í føroyskum sum annaðmál, sum hevur tryggjað møguleika fyri, at tað nú eru 3 til 4 flokkar í føroyskum sum annaðmál, sum arbeiða eftir námsætlanini. Kvøldskúlaleiðslurnar í Runavík, í Fuglafirði, í Eysturkommunu og í Klaksvík hava í samstarvi við Barna- og útbúgvingarmálaráðið og leiðsluna á Miðnámi á Kambsdali avtalað at seta eina royndarskipan í verk, sum veitir undirvísing í føroyskum sum annaðmál sambært námsætlanini, og sum verður staðsett á miðnámsskúlanum á Kambsdali. Har er ein flokkur stovnsettur, Tað eru nógvir tilflytarar í hesum øki, og tørvurin er vaksandi.

Umframt tey drúgvu undirvísingartilboðini í føroyskum sum annaðmál verða styttri málskeið fyriskipað kring landið. Í 2023 hava tey verið umleið níggju.

Í 2022 varð serstøk játtan útvegað til at undirvísa ukrainskum flóttum. Í 2023 er henda játtan partur av játtanini til undirvísing í føroyskum sum annaðmál.

Í øllum Føroyum er tað ein avbjóðing hjá tilflytarum at fáa arbeiðslív, útbúgving og familjulív at hanga saman. Tað er ein sannroynd, at 40 tíma arbeiðsvika darvar møguleikanum hjá einum næmingi at gjøgnumføra drúgvari málskeiði á upp til 20 tímar um vikuna.

Mett verður, at ein Málskúli fyri føroyskt sum annaðmál kann samskipa undirvísingartilboðini kring landið, so at sum flest fáa møguleika fyri at fylgja undirvísing og at tekna seg til royndir sambært galdandi námsætlan. Og mett verður at ein Málskúli kann tryggja allar tær stuðulsfunktiónir, sum eiga at vera, tá útbúgving verður fyriskipað, tryggja setanarviðurskiftini hjá undirvísarum, at allar GDPR-reglur um persónsviðkvæmar upplýsingar verða fylgdar o.a.

Tá lógin um Málskúla ikki nevnir CEFR-skipanina, sum galdandi námsætlan fyri vaksin byggir á, so er tað til tess at tryggja, at innan lógarinnar karmar kunnu henda møguligar broytingar, sum verða staðfestar í námsætlan og kunngerð. Nærri reglur um námsætlan og CEFR-skipanina verða ásettar í kunngerð til lóg um Málskúla fyri føroyskt sum annaðmál.

Skotið verður upp, Málskúlin fyri føroyskt sum annaðmál kann undirvísa næmingum í fólkaskúlanum frá 12 ára aldri og eldri og sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál. Tað er gjørd námsætlan fyri føroyskt sum annaðmál fyri fólkaskúlan. Um Málskúlin bjóðar undirvísingartilboð fyri fólkaskúlanæmingar 12 ár og eldri, so verður arbeitt sambært hesi námsætlan.

**Tørvurin á undirvísing í FSA veksur skjótt**
At tørvurin veksur skjótt sæst eisini aftur á fíggjarlógini.

Í 2019 var játtanin til tímar til undirvísing í føroyskum sum annaðmál uml. 800.000 kr. Í 2022 var játtanin 2.3 mió. umframt eina eykajáttan til ukrainskar flóttar á 1. mió. Mett verður, at samlaði tørvurin á játtan til undirvísing í føroyskum sum annaðmál kring alt landið í 2023 verður 3,9 milliónir.

Umsóknir fyri várið 2023 vóru upp á 4.165 tímar.

Við verandi játtanarskipan kosta 4.165 tímar: 1.882.580 kr.
Verður tørvurin tann sami heysthálvuna 2023, so kostar alt árið 2023: 3.765160 kr.

Niðurstøðan er, at tað er trupult hjá smærri kommunalum eindum at skipa fyri undirvísing og útbúgving í føroyskum sum annaðmál sambært námsætlanini, og hjá teimum størru kvøldskúlaskipanunum er tað eisini ein stór uppgáva at skipa fyri beinleiðis útbúgving. Tí tað krevjast heilt onnur atlit at útbúgvingarvirksemi enn til frítíðarskúlakúlavirksemi. Talan er um uppgávur, sum vanliga ikki eru álagdar sambært frítíðarundirvísingarskipanini, og sum krevja nógv av lærarum, leiðslu, samskipan, skráseting, visitering, próvtøkuhaldi, lestrarvegleiðing og lestrarmenning o.a.
Lagt kann verða afturat, at kommunalu frítíðarskipanirnar hava gjørt eitt megnar arbeiði, og lagt lunnar undir eina málskúlaskipan, sum hetta lógaruppskot byggir á herðarnar á. Lógaruppskotið leggur upp til, at kommunalar málskúlaleiðslur varðveittar, sum eftir ætlan skulu samstarva við málskúlaleiðsluna.

Við hesum verður skotið upp, at Løgtingið samtykkir eina lóg um Málskúla fyri føroyskt sum annaðmál, sum samskipar alla undirvísing í føroyskum sum annaðmál í Føroyum fyri borgarar í aldrinum 12 ár og eldri.

Málskúlin skipar fyri visitering, stovnar flokkar, skipar fyri royndum, fyri námsfrøðiligum menningararbeiði, setir lærarar og starvsfólk í starv og samskipar tilgongdina, so at allir tilflytarar og borgarar, sum hava annað mál enn føroysk sum teirra fyrsta mál, fáa møguleika fyri at fáa undirvísing, sum er á tí stigi, sum tey eru á, sama hvar í landinum tey búgva.

Tessvegna er umráðandi at henda samskipanin fer fram í tøttum samstarvi við tær kommunalu málskúlaeindirnar, sum verða skipaðar, sum framhald av teimum kommunalu kvøldskúlaeindunum.

Hetta lógaruppskot er hugsað soleiðis, at tað í Undirvísingarstýrinum verður sett ein samskipandi eind á stovn, sum er málskúlastjórin, sum samstarvar við kommunalar málskúlaeindir. Tær kommunalu málskúlaeindirnar kunnu vera tær kvøldskúlafyriskipanir, sum eru.
Lógaruppskotið tryggjar møguleikan fyri, at tað eru í minsta lagi tríggjar til fýra kommunalar málskúlaeindir, sum undirvísa sambært lýstari námsætlan, sum í dag byggir á CEFR-skipanina, men at talið av eindum kann verða broytt eftir samráðingum millum partarnar, og tá ið tørvur er á tí.
Henda fyritreyt ger tað neyðugt, at kommunurnar skipa samstørv, so at næmingalagað og stigrættað undirvísing sambært námsætlanini kann vera til gagns fyri so nógv sum møguligt ymsastaðni í landinum, men ikki í øllum kvøldskúlum. Skipanin verður landsumfatandi skilt á tann hátt, at næmingar kunnu lesa føroyskt sum annaðmál, har tey ynskja tað, um tilboðið er tøkt. Lagt kann vera afturat, at tað longu eru stig tikin til tílík samstørv í Suðuroy, í miðøkinum og í norðurøkinum.

Hetta lógaruppskot heimilar eisini, at Málskúlin fyri føroyskt sum annaðmál skipar fyri styttri málskeiðum, sum kunnu vera byrjanarskeið, ella meiri miðvís skeið, sum menna ein ávísan umbidnan førleika. Málskúlastjórin skal tryggja, at eisini hesi fáa í boði at verða eftirmett, so at førleiki teirra kann ganga inn í eina møguliga seinni FSA-útbúgving ella aðra útbúgvingargongd ella førleikamenning hjá tí einstaka næminginum.

**Fíggingin av verandi skipan og fígging av málskúlanum**
Á vári 2023 vóru 13 flokkar í Føroyum, sum arbeiddu sambært námsætlanini. Afturat teimum vóru 9 styttri skeið, sum kosta umleið 350.000 kr. í 2023.

Ein flokkur sbrt. CEFR skipanini kostar sostatt smáar 270.000 kr. um árið, sum er umleið eitt hálvtíðarstarv.

Gera vit eina landsumfatandi skipan, so metir Barna- og útbúgvingarmálaráðið, at tørvur verður á umleið sjey ársverkum til undirvísingar og hálvumøðrum ársverki til leiðslu, próvtøkufyriskipan, vititatión, rakstur og annað. Tilsamans 8,5 ársverk.
Harumframt verður tørvur á einari játtan til endurgjald til kommunalar málskúlaeindir og til framleiðslu av undirvísingartilfari og próvtilfari.

Um vit taka støði í tí virksemi, sum er kring landið í dag, so verður til tess at stovna og reka ein landsumfatandi Málskúla í føroyskum sum annaðmál í Føroyum sambært hesi lóg tørvur á:

1. Einum málskúlastjóra = 1 ársverk = ca. 600.000 kr

2. 1/2 ársverki til skrivstovuhald, rakstur, lestrarvegleiðing og annað = ca. 300.000 kr.

3. 7 ársverkum til undirvísarar: 3.850 mió.

4. 350.000 kr. til endurgjald til kommunur.

5. ca. 350.000 kr. til stuttskeið kring landið. Annaðhvørt sum endurgjald til vanliga kvøldskúlaundirvísing, ella sum Málskúlin sjálvur fyriskipar.

6. uml. 1.4 mió. til Nám/Próvstovu til undirvísingartilfar og próvtilfar og skeiðs- og eftirútbúgvingarvirksemi.

Tilsamans: 6.850 milliónir kr.

Til endamálið er í 2023 játtað: 3.85 mió. til undirvísing og 2.5 mió. til verkætlanina Føroyskt sum annaðmál (útbúgving, próvtilfar og undirvísingartilfar).Tilsamans 6.350 mió. í 2023.

Tað merkir, at játtanin til Málskúla í føroyskum sum annaðmál, til leiðslu, próvtøkuhald, undirvísingartilfar og skeiðsvirksemi o.a. frameftir verður umleið 500.000 kr. hægri enn játtanin var í 2023. Rakstrarkostnaðurin veldst sjálvandi um vaksandi ella minkandi tørv.

Tá er játtan ikki sett av til framhald av master/bachelorútbúgving av lærarum í føroyskum sum annaðmál. Framhald av master/bachelorútbúgving fyri lærarum í føroyskum sum annaðmál verður mett at kosta 1,2 mió. um árið í tvey ár.

Játtan er heldur ikki sett av til lestrarstuðul til fulltíðarlesandi á FSA. Um vit meta, at tað vera umleið 100 fulltíðar FSA-lesandi um árið sum møguliga fáa rætt til lestrarstuðul í 10 mánaðir um árið, so kann tann útreiðslan verða uml. 6 mió. um árið.

Tað er hugsandi, at tørvurin á undirvísing í føroyskum sum annaðmál fer at vaksa so hvørt sum talið av borgarum, sum hava føroyskt sum annaðmál, veksur.

Ein av teimum heilt stóru avbjóðingunum hevur verið, at lærarar sum arbeiða í skipanini og sum førleikamenna seg til dømis við at fylgja eftirútbúgving á Fróðskaparsetrinum, ynskja at fáa fastari setanartreytir við vanligum starvsfólkarættindum. Eisini til tess at tryggja setanarviðurskiftum lærarans og fakligu og námsfrøðiligu menning málskúlans, er neyðugt at skipa økið sum ein skúla.

**1.1. Orsakir til uppskotið**

Orsøkin til, at lógaruppskotið verður framlagt er, at tørvur er á at skipa ein løgfrøðiligan karm fyri undirvísing av borgarum í Føroyum, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál. Umráðandi er, at hetta lógarverk tryggjar samstarv við kommunurnar á ein hátt sum líkist tí samstarvi, sum hevur verið innan lóg um frítíðarundirvísing. Ein lógarkarm, sum er fleksibul og skjótt kann laga undirvísingartilboðini til tørvin hjá borgarum, samfelagnum og vinnuni og til ta til eina og hvørja tíð galdandi námsætlan, eins og til tann staðbundna tørvin.

**1.2. Galdandi lóggáva**

Undirvísing fyri borgarar, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál, hevur higartil verið heimilað í lóg um frítíðarundirvísing kap. 3 um serstaka frítíðarundirvísing. Tørvur er tó á greiðari lógarheimild, so at starvsfólk kunnu setast í starv, og at útbúgving kann veitast samsvarandi námsætlan og við støði í próvtilfari, sum Próvstovan útvegar. Somuleiðis er tørvur á samskipan, so at borgarar kring landið fáa sama útbúgvingarmøguleika.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**

Endamálið við uppskotinum er at tryggja borgarum, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál, neyðuga undirvísing í føroyskum. Mett verður, at tað er umráðandi, at tilflytarar læra um mentan og samfelag og at samskifta á føroyskum, tí hetta vil verða við til at tryggja eina góða integratión. Tessvegna eigur eisini dentur at verða lagdur á, at tað í undirvísingini verður tikið atlit at samleika og mentanarfatan næmingsins, sum er neyvt tongd at annaðmálslæring.

Fyri at tryggja, at allir tilflytarar fáa somu undirvísingar- og útbúgvingartilboð verður tískil skotið upp at stovna ein málskúla fyri føroyskt sum annaðmál, sum skal fevna um alt landið.

Uppskotið skal eisini tryggja, at ávísar vinnur, har tað verður mett neyðugt, kunnu umbiðja sær serstøk tilboð um undirvísing til síni starvsfólk. Tá kann undirvísingartilboðið verða fyriskipað fyri gjald sambært reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir.

Uppskotið tryggjar harumframt, at øll viðurskifti, sum eiga at verða fyriskipað á einum útbúgvingarstovni verða undir leiðslu málskúlastjórans og landsstýrismansins. Eitt nú setanarviðurskifti hjá lærarum, rættindi næmingsins, undirvísing, og próvtøka, skráseting o.a.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Avleiðingarnar av uppskotinum er, at landið átekur sær samskipandi ábyrgd av, at borgarar, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál, kunnu nema útbúgving í føroyskum sum annaðmál kring alt landið, og at undirvísingartilboðið verður samskipað við kommunurnar í Føroyum skilt á tann hátt, at kommunurnar útvega hóskandi undirvísingarhøli og hava eina kommunala málskúlaleiðslu, sum samskipar virksemið saman við leiðsluni í Málskúlanum. Og at próvtilfar, undirvísingartilfar og onnur neyðug tænasta í sambandi við útbúgvingarvirksemið verður tryggjað, eins og at trygg skráseting av næmingum og næmingaavrikum verður fyriskipað.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Ummæli: Verður sent skúlum, øllum aðalráðum, Útlendingastovu, Løgmálaráðnum, Pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, UVS, og kommunum og kommunufelagnum til ummælis.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Fíggjarligu avleiðingarnar fyri landið er at stovna ein skúla, seta eina leiðslu og samskipa virksemið kring landið. Í verandi støðu verða tað á fíggjalógini játtaðar 3.85 mió. til endamálið, eins og at tað verða játtaðar 2.5 mió. til verkætlanina Føroyskt sum annaðmál. Á vári 2023 vóru tað 13 flokkar í Føroyum, sum arbeiddu sambært námsætlanini. Afturat teimum vóru 9 styttri skeið, sum kosta ca. 350.000 kr.

Við at seta á stovn eina landsumfatandi skipan, verður tørvur á 7 ársverkum til undirvísing, og hálvumøðrum til leiðslu v.m., og verður tað sostatt talan um 8,5 ársverk.

Harumframt verður tørvur á einari játtan til endurgjald til kommunalar málskúlaeindir og til framleiðslu av undirvísingartilfari og próvtilfari.

Um vit taka støði í tí virksemi, sum er kring landið í dag, so verður til tess at stovna og reka ein landsumfatandi málskúla fyri tilflytarar í Føroyum sambært hesi lóg tørvur á umleið 6,85 mió. - sjá útgreining á s. 7-8. Tá er játtan ikki íroknað til eftirútbúgvingartilboð til lærarar í føroyskum sum annaðmál.

### Fíggjarligu avleiðingarnar fyri kommunurnar

Fíggjarligu avleiðingarnar fyri kommunurnar verða ongar samanborið við tær útreiðslur, sum kommunurnar longu bera nú.

Sambært uppskotinum skulu kommunurnar útvega hølisviðurskifti. Tað gera tær eisini nú.

Sambært uppskotinum skal tað harnæst vera ein kommunal málskúlaleiðsla á staðnum. Í dag eru tað kommunalar kvøldskúlaleiðslur á staðnum, og sum kommunan fíggjar, sum røkja hesa uppgávu. Lógaruppskotið leggur upp til, at málskúlin fyri føroyskt sum annaðmál samstarvar við tær kommunalu málskúlaleiðslurnar, sum kunnu vera tær kommunalu kvøldskúlaleiðslurnar.

Lógaruppskotið leggur eisini upp til, at landsstýrismaðurin fær heimild til at endurrinda eina upphædd fyri uppgávuna at útvega undirvísingarhøli og kommunala leiðslu, og at rætturin til endurgjald er upp til 8% av teirri løn, sum verður útgoldin á tí kommunala málskúlanum til undirvísing í føroyskum sum annaðmál. Eisini henda skipanin er lík teirri, sum er galdandi í dag.

Samanlagt verður mett, at endurgjald til kommunalar málskúlaeindir fyri undirvísingarhøli og leiðslu verður umleið 350.000 kr. árliga. Tað er nakað meira enn endurgjaldsfrymilin fyri kommunalari leiðslu av serstakari frítíðarundirvísing í føroyskum sum annaðmál heimilar í dag.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Umsitingarligu avleiðingarnar fyri landið verður at seta á stovn ein Málskúla fyri føroyskt sum annaðmál, seta ein málskúlastjóra, sum skal taka á seg at reka landsumfatandi virksemi skúlans sambært lógini um málskúla. Ætlanin er, at málskúlaleiðslan verður staðsett í Undirvísingarstýrinum, og at málskúlaleiðslan fær ábyrgd av at umsita játtanina til endamálið, seta lærarar og starvsfólk í starv, at skipa fyri próvtøkum, royndum, eins og fyri visitatión av næmingum, at samskifta við kommunalar málskúlaleiðslur og at menna virksemi skúlans, so at borgarar sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál kring landið, fáa møguleika fyri at taka lut í undirvísing, sum er lagað til tørvin hjá tí einstaka.

Umsitingarligu avleiðingarnar fyri kommunurnar verða at samskifta og saman við málskúlastjóranum at fyrireika virksemið undan hvørjari skúlaárshálvu og at semjast um hølisviðurskifti, arbeiðsumstøður hjá lærarum og onnur viðurskifti, sum kunnu hava við dagliga raksturin at gera.

Somuleiðis er tað hugsandi, at nýkomin og tilflytarar, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál, verða víst til tann kommunala myndugleikan á staðnum, sum leiðbeinir tilflytaran í málum, sum hava við útbúgvingarmøguleikar at gera.

Er næmingurin innskrivaður á FSA-útbúgving, er tað málskúlaleiðslan og tann kommunala málskúlaleiðslan, sum samskiftir við næmingin Men tað er ikki Málskúlin fyri føroyskt sum annaðmál, sum tekur avgerðir, sum hava við uppihaldsrættindi at gera.

Mett verður ikki, at kommunurnar fáa útreiðslur, sum tær ikki hava í dag, í sambandi við hetta lógaruppskot. Tvørturímóti gevur lógruppskotið landsstýrismanninum heimild til at endurrinda kommunum fyri útreiðslur í sambandi við kommunalu málskúlaleiðslu og fyri at útvega undirvísingarhøli.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Mett verður, at vinnan í Føroyum hevur stóran tørv á útlendskari arbeiðsmegi, og at arbeiðsmegin, sum kemur til Føroya, hevur tørv á undirvísing í føroyskum sum annaðmál til tess at útinna vinnuligu uppgávurnar á bestan hátt.

Vinnan kann koma í ta støðu, at útlendska arbeiðsmegin hevur tørv á umstøðum at fara á málskúla.

Vinnan fær harumframt møguleika fyri at umbiðja beinleiðis málrættaði málskeið til ta arbeiðsmegi, sum ein ávís fyritøka hevur tørv á.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Ávirkanin fyri serstøk øki í landinum er, at skipanin verður landsumfatandi, og at øll øki í landinum eiga at fáa møguleika fyri at bjóða borgarum, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál í sínum øki, javnlík undirvísingartilboð.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Eitt av høvuðsendamálunum við hesum uppskoti er at tryggja eina so væleydnaðari integratión sum møguligt. Tað ávirkar allar samfelagsbólkar, og allar samfelagsskipanir rættan veg, um tað eydnast at skipa integratiónina, so at borgarar sum ikki hava føroyskt sum sítt fyrsta mál fáa somu møguleikar og rættindi til inklusión og útbúgving og verða javnsett á arbeiðsmarknaðinum og í samfelagnum við føroyingar. Eins og møguleikar fyri framhaldandi menning.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri nakran millumtjóða sáttmála.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tvørgangandi sáttmálar.

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Tað er einki í lógaruppskotinum, sum ikki sampakkar við Løgtingslóg nr. 66 frá 18. mai 2006 um at seta í gildi Hoyvíkssáttmálan - Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Tað er einki í lógaruppskotinum, sum ikki sampakkar við Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneske-rettighedskonvention.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Tað er einki í lógaruppskotinum, sum ikki sampakkar við Bekendtgørelse nr. 20 af 15. november 2017 af FN-konvention af 13. december 2006 om rettigheder for personer med handicap.

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið elvir ikki til markaforðingar, og ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Málskúlin kann smbrt § 2 stk. 2 og stk. 3 eftir áheitan og sambært serstakari játtan skipa fyri øðrum, undirvísingar- og útbúgvingarvirksemi, sum verður fyriskipað fyri borgarum, sum ikki hava føroyskt sum sítt fyrsta mál og verður tað í stk. 4 heimilað landsstýrismanninum at áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi. Tað er ásett í lógini at gjaldið ongantíð kann vera hægri enn tann ítøkiligi kostnaðurin av at fyriskipa skeiðið.

Sostatt gevur lógaruppskotið landsstýrismanninum heimild at skipa undirvísing í Føroyskum sum annaðmál fyri gjald. Talan kann verða um serlig umbiðin skeið, sum annaðhvørt ein almenn ella ein privat fyritøka umbiður.

Við heimildini kann landsstýrismaðurin áseta reglur um gjald fyri serstaka undirvísing í føroyskum sum annaðmál í kunngerð.

Meginreglan er, at útbúgvingin er ókeypis fyri næmingin, sum skrivar seg inná útbúgving í føroyskum sum annaðmál. Í útbúgvingarkunngerðini verður ásett, hvussu viðurskiftini eru viðvíkjandi møtiskyldu, serligum fyriskipanum, hvussu ofta, og hvussu leingi ein næmingur kann skriva seg inn til undirvísing og próvtøku í føroyskum sum annaðmál og so framvegis, reglur um farloyvi, lestrarvegleiðing, undantøk og annað.

Endamálið við heimildini at áleggja gjøld er einans at kunna skipa fyri serligt umbidnari undirvísing í føroyskum sum annaðmál. Endamálið er ikki at at hava eitt yvirskotsbaserað virksemi. Tað merkir, at gjald fyri umbiðin skeið kunnu ikki verða hægri enn kostprísurin fyri umbidna skeiðið.

Sambært grein 9 í lógaruppskotinum er heimild at taka gjald fyri undirvísingartilfar:
Talan er um heimild at krevja gjald fyri 1) serstøk skeið, sum málskúlastjórin kann skipa fyri, umframt 2) heimild til kommunurnar at krevja gjald fyri undirvísingartilfar, t.d. bøkur o.a. Gjaldið má aldrin fara upp um kostprísin.

Eisini í hesum føri er einans tala um eina umsitingarliga fyriskipan, og ikki ein heimild hjá málskúlanum at fáa vinning av virkseminum.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið áleggur kommunum ella kommunalum samstørvum at skipa fyri hølum o.a. til dagligan rakstur av undirvísing í føroyskum sum annaðmál á staðnum.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**

Lógaruppskotið fer at stuðla upp undir, at borgarar, sum ikki hava føroyskt sum fyrsta mál, fáa amboð, ið kunnu stuðla undir góða integratión. Við at bjóða undirvísing í føroyskum sum annaðmál, verður tilgongdin betri til ein gerandisdag, harundir eisini sosialar relatiónir, arbeiðslív v.m.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

**Til § 1**
Endamálið við lógini um Málskúla fyri føroyskt sum annaðmál (her eftir Málskúlin) er at skipa ein løgfrøðiligan karm fyri einum landsumfatandi málskúla fyri borgarar í Føroyum, sum ikki hava føroyskt sum fyrsta mál.
Málskúlin fyri føroyskt sum annaðmál er sjálvstøðugur stovnur, sum er undir málsræði landsstýrismansins í barna- og undirvísingarmálum, og málskúlastjórin hevur dagligu leiðsluna av skúlanum, av samstarvinum millum málskúlan og kommunur og kommunalar málskúlaleiðslur og av øllum øðrum samstarvi við undirvísingarmyndugleikar og útlendingamyndugleikar, Próvstovu og aðrar viðkomandi undirvísingarstovnar.

§ 1. Stk 2.
Endamálið við Málskúlanum er at tryggja holla integratión í samfelagnum og javnstøðu á arbeiðsmarknaðinum millum allar borgarar. At tryggja, at borgarar, sum hava annað mál enn føroyskt sum teirra fyrsta mál kunnu fáa eitt útbúgvingartilboð í føroyskum sum annaðmál, sum mennir samskiftisførleikar nømingsins og gevur næminginum innlit í mentanarlig og samfelagslig viðurskifti í Føroyum.

Málskúlin kann eisini átaka sær uppgávuna at skipa fyri móttøkuflokki fyri eldru næmingum í fólkaskúlanum, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál. Tess vegna verður aldursmarkið sett til 12 ár. Verður hesin møguleiki brúktur, skal neyv avtala fyriliggja millum tann skúlan, har næmingurin er innskrivaður, kommununa og málskúlan.

Slíkt samstarv um móttøkuflokk fyri eldri næmingum í fólkaskúlanum skal verða fráboðað og góðkent av landsstýrismanninum viðvíkjandi innihaldi og vavi og lagt til rættis saman við kommunalu fólkaskúlamyndugleikunum og Undirvísingarstýrinum. Undirvísing í móttøkuflokki í Málskúlanum skal eisini fylgja lógum og kunngerðum fólkaskúlans.

Virksemi komandi Málskúlans er ætlað sum framhald av tí arbeiði at undirvísa tilflytarum í føroyskum sum annaðmál, sum kvøldskúlarnir kring landið hava útint innan heimildir frítíðarlógarinnar kap. 3 um serstaka frítíðarundirvísing. Henda uppgáva er blivin størri og meira umfatandi nú, millum annað tí at talið av borgarum, sum hava føroyskt sum annaðmál, er skjótt vaksandi og eisini, av tí at tørvur er á fleiri miðvísum integratiónsátøkum.

§ 1. Stk 3
Til tess at tryggja holla integratión eigur útbúgving í føroyskum sum annaðmál at skapa karmar, so at næmingurin framhaldandi kann menna seg málsliga og persónliga. Og at dentur verður lagdur á, at undirvísingin tekur atlit at samleika og mentanarfatan næmingsins.

**Til § 2**
Í Málskúlanum verður undirvíst sambært lýstari námsætlan fyri føroyskt sum annaðmál. Námsætlanin, sum fyriliggur, og sum verður lýst í kunngerð byggir á altjóða evropeiska CEFR skipanina.

CEFR merkir: Common European Framework of Education, og er ein altjóða viðurkend skipan, sum tryggjar gjøgnumskygni millum førleikastig og kommmunikativar førleikar

(samskiftisførleikar), sum hin einstaki tilflytarin/nemingurin hevur ognað sær. Tá ið CEFR-skipanin ikki er nevnd í lógartekstinum, so er tað til tess at tryggja, at eisini onnur útbúgvingartilboð kunnu fara fram í skúlanum sambært góðkendari námsætlan, og at lógarbroyting ikki krevst um broytingar verða gjørdar í námsætlanini.

Galdandi námsætlan er skipað sum tríggjar útbúgvingar FSA1, FSA 2 og FSA 3. Næmingur verður visiteraður inn á ta útbúgving, sum hóskar best til undanførleikarnar hjá næminginum. Hvør útbúgving er skipað í fýra modul, og vanliga kann ein næmingur avgreiða eitt modul hvørja lestrarhálvu. Tað ber tó til at koma gjøgnum útbúgvingina væl skjótari, um næmingur megnar at standa royndirnar skjótari. Og tað kann eisini taka longri tíð. Hesi viðurskifti fer málskúlastjórin at umsita og hava ábyrgd av.

Nærri reglur um námsætlan og CEFR-skipanina verða ásettar í kunngerðini, sum eisini kunnger galdandi námsætlan.

Til hesa lóg um Málskúla verður ein útbúgvingarkunngerð gjørd. Og sambært kunngerðini verður námsætlanin lýst, sum er grundarlagið undir meginvirksemi málskúlans. Próvstovan skipar fyri, at royndir og annað eftirmetingartilfar verður gjørt, og er klárt til nýtslu, tá ið tørvur er á tí. Eisini skipar Próvstovan saman við málskúlastjóranum og Undirvísingarstýrinum fyri, at próvtøl, persónsupplýsingar og annað verður varðveitt á tryggan hátt.

§ 2 stk. 2
Málskúlin kann eisini skipa styttri skeið, sum ikki fylgja CEFR skipanini, skilt á tann hátt, at næmingarnir ikki fara til roynd. Tó kann tað standa næmingum, sum hava fylgt styttri grundskeiði í boði á kommunalum málskúla, at verða visiteraðir sambært CEFR skipanini. Slíka visitering hevur málskúlastjórin ábyrgdina av.

Omanfyristandandi skal síggjast í ljósinum av einum ynski um, at varðveita eina skipan sum líkist tí, sum vit hava í dag, og tískil eiga hesi stuttu skeiðini at kunna verða sett á stovn fleiri staðni í Føroyum – ikki bert í teimum 3 – 4 deplunum. Av tí at neyvt samskifti verður millum kommunalu málskúlaleiðslurnar/kvøldskúlaleiðslurnar og málskúlastjóran ber til at tryggja, at tilboðini verða so atkomulig sum gjørligt.

Latið verður upp fyri, at kvøldskúlar framhaldandi skulu kunnu søkja um játtan til tímar til stuttskeið í føroyskt sum annað mál. Málskúlastjórin ger í samstarvi við kommunalu málskúlaleiðarnar og kvøldskúlaleiðarnar og í samráð við málskúlaráðið á hvørjum ári eina meting av tørvinum á stuttskeiðum og drúgvum skeiðum.

§ 2 stk. 3
Sambært § 2, stk. 3 kann málskúlin veita umbiðin skeið fyri borgara, sum ikki hava føroyskt sum sítt fyrsta mál. Hesi skeið kunnu venda sær til ávísan málbólk, og verða heilt ella partvíst fíggjað av tí, sum umbiður skeiðið. Og tað kann vera bæði privatur ella almennur stovnur ella felagsskapur, sum umbiður hesi skeið.
Sum dømi kann nevnast, at málskúlin í samstarvi við fyrispurning og fígging kann fyriskipa skeið fyri komandi starvsfólk innan vælferðargeiran, ella innan ávísa vinnugrein. Eitt annað dømi kundi verið, at málskúlin eftir áheitan og sambært neyðugari fígging skipar fyri til dømis donskum sum annaðmál.

Eisini kann landsstýrissmaðurin við hesari heimild fyriskipa undirvísingartilboð fyri borgarar, sum ikki hava føroyskt sum sítt fyrsta mál, har sum landsstýrismaðurin metir, at stórur tørvur er á tí.

Tað veldst um umstøður málskúlans, fígging, arbeiðsorku og, um Málskúlin er førur fyri at ganga tilíkari umsókn á møti.

§ 2 stk. 4
Sambært hesi grein fær landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum heimild at áseta nærri treytir í sambandi við at skipa fyri umbidnum skeiðum, og at áseta reglur um gjald og annað hesum viðvíkjandi.

**Til § 3**
Í fleiri førum kann Málskúlin samanberast við Musikkskúlaskipanina skilt á tann hátt, at undirvísing verður boðin sambært serstakari lóggávu og í samstarvi við lokalar kommunalar skipanir.

Ein munur millum musikkskúlaskipanina og málskúlaskipanina er, at í Málskúlanum hevur málskúlastjórin evstu námsfrøðiligu og fakligu ábyrgdina av øllum virkseminum kring landið, og eisini er tað málskúlastjórin, sum skipar fyri visitering, stovnar flokkar og skipar fyri og fyri stig- og støðuroyndum og próvtøkum annars eftir tørvi.

Somuleiðis verður tað málskúlastjórin, sum fær ábyrgdina av fakligari menning av starvsfólkum eins og at samskifta við myndugleikar um mál, sum hava týdning fyri bæði skúlan, starvsfólk og fyri næmingar, eins og um mál, sum hava týdning fyri, at so nógvir tilflytarar sum møguligt fáa høvi at ogna sær málsligar og mentanarligar førleikar, sum kunnu tryggja eina góða integratión.

§ 3 stk. 2
Sambært námsætlanini eru Føroyskt sum annaðmál útbúgvingarnar (FSA-útbúgvingarnar) skipaðar sum tríggjar ymiskar útbúgvingar, og hvør útbúgving er samansett av fýra tigum. Tá ið næmingur byrjar undirvísingina, verður hann visiteraður inn á útbúgving og stigs, og fyri at skifta frá einum stigi upp á næsta stig skal næmingur standa eina stigroynd. Hesum arbeiði fyriskipar málskúlastjórin í góðari tíð undan hvørjari lestrarhálvu, so at næmingur fær tað undirvísingartilboð, sum næminginum tørvar við so góðari atkomu til lestrarstaðið sum møguligt. Málskúlastjórin skipar fyri hesum arbeiði í samstarvi við kommunalu málskúlaleiðararnar.
Í samstarvi við kommunalu málskúlaleiðararnar verður undirvísingin løgd til rættis og lærarar settir at hava undirvísingina um hendi.

Í kommunu, har eingin kommunalur málskúli er, men har ein tørvur verður staðfestur, kann málskúlin við heimild frá landsstýrismanninum sjálvur skipa fyri undirvísing og útbúgving.

§ 3 stk. 3 og 4
Sambært hesi lóg verður undirvíst sambært galdandi námsætlan. Galdandi námsætlan í 2023 og 2024 byggir á CEFR-stigan. Próvstovan útvegar royndir, sum næmingur skal standa fyri at flyta upp á næsta tig, og loksins fyri endaroynd.

Ávegisroyndir verða eftirmettar við próvmetinum staðið/ikki staðið.
Næmingur, sum fer til sendaroynd, fær próvtal sambært 12-tals stiganum.
Málskúlastjórin skal fyriskipa stig- og støðuroynd eftir tørvi hvørja lestrarhálvu. Og málskúlastjórin skal fyriskipa stigroynd, tá ið lærari ella kommunalur málskúlaleiðari umbiður tað, so at næmingur kann byrja lestur á hægri moduli, um næmingur stendur stigroyndina. Lógin heimilar, at námsætlanin kann verða broytt. Tað er tó umráðandi at Málskúlin til eina og hvørja tíð arbeiðir sambært galdandi lýstari námsætlan.

Sambært hesari lóg verður møguligt at skipa fyri øðrum undirvísingarvirksemi enn FSA-útbúgving, eisini fyri borgarum sum ikki hava føroyskt sum sítt fyrsta mál. Um hesin møguleiki verður troyttur, skal tað eisini bera til at eftirmeta tað undirvísing/útbúgving, sum verður fyriskipað. Og málskúlastjórin skal taka neyðug stig til eftirmeting og ella próvtøku, so skal tað vera í samstarvi við avvarðandi myndugleika og próvstovu. Próvstovan útvegar neyðugt próvtøkutilfar, sum skal verða umbiðið í so góðari tíð, at Próvstovan kann tryggja, at próvtøkutilfarið er tøkt. Eitt dømi kundi verið skeið/útbúgving fyriskipað til tess at tryggja, at borgari, sum hevur annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál, kann røkja starv í eitt nú heimarøkt ella á bústovni, ella at ávísur vinnugeiri umbiður skeið ella útbúgving fyri at førleikamenna útlendska arbeiðsmegi.

§ 3 stk. 5
Nágreinar, at tað er málskúlastjórin, sum hevur fíggjarliga og fyrisitingarliga ábyrgd av landsumfatandi rakstri Málskúlans.

§ 3 stk. 6
Til lógina um Málskúla fyri føroyskt sum annaðmál setur landsstýrismaðurin útbúgvingarkunngerð og próvtøkukunngerð í verk, sum nágreina øll viðurskifti kring FSA-útbúgvingina. Innskriving, visitatión, undirvísing, royndir, sjúkraroynd, lestrarvegleiðing, skilhaldsreglur, um útbúgvingartíð, møtiskyldu og rættindi næminganna.

**Til § 4**
Fyri at koma undir skipanina í hesi løgtingslóg, skal kommunalur málskúli vera knýttur at eini kommunu ella at einum kommunalum samstarvi, hereftir kommuna.
Sum frágreitt í almennu viðmerkingunum til lógina um málskúla fyri føroyskt sum annaðmál, byggir henda nýggja skipanin á herðarnar á tað arbeiði, sum lokalir kvøldskúlar hava lagt lunnar undir innan heimildirnar í frítíðarundirvísingarlógini.
Tað verður lagt upp til, at samstarvið millum land og kommunu heldur fram í sambandi við at bjóða tilflytarum hóskandi undirvísingartilboð at læra føroyskt mál, um mentan og um samfelag.
Royndirnar vísa, at tað skal ein ávís støðd á undirvísingareind til, fyri at tryggja, at næmingur fær møguleika at verða undirvístur á framhaldandi førleikastigum og fyri at tryggja, at lærarar kunnu hava Málskúlan sum høvuðsarbeiðsstað. Tessvegna verður neyðugt at skipa undirvísingareindirnar í hóskandi støðd, og at kommunur semjast um at samstarva um at seta kommunala málskúlaleiðslu, sum málskúlastjórin kann samstarva við, m.a. í sambandi við setan av lærarum, innskriving av næmingum og skipan av lestrarhálvunum, um undirvísingarhøli og annað.

Undir verandi umstøðum verða tey drúgvaru málskeiðini havd í trimum støðum.

1. Í Suðuroynni, har allar kommunurnar hava skipað seg í samstarvi
2. Í Tórshavn, sum hevur skipað samstarv við allar kommunurnar í Vágum og
3. Á Miðnámsskúlanum á Kambsdali, sum í samstarvi við kvøldskúlaleiðslurnar í Eysturoy og í Klaksvík fyriskipar undirvísing í føroyskum sum annaðmál fyri vaksin sambært námsætlanini og sambært somu játtanartreytum sum kvøldskúlarnir annars.

Lagt verður upp til, at hesar tríggjar eindir halda fram, og at kommunal málskúlaleiðsla verður fyriskipað. Kommunala málskúlaleiðslan kann vera tann kommunali kvøldskúlaleiðarin sbrt § 7 stk. 2.

Við tí næmingagrundarlagi, sum er í dag, (uml. 300 um árið,) verður mett, at millum tríggjar og fýra málskúlaeindir kunnu røkja uppgávuna at tryggja tilflytaranum í Føroyum, sum ikki hava føroyskt sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál atgongd til neyðuga undirvísing og útbúgving í føroyskum máli, mentan og samfelagsviðurskiftum eins og til stig- støðuroyndir og eftirmeting.

Við teirri skipan, sum henda lógin leggur lunnar undir, ber tó eisini til at skipa bæði fleiri og færri økir. Tað er samskiftið við kommunurnar um hesi viðurskifti, sum málskúlastjórin skal standa á odda fyri. Endamálið er, at skúlans ressursir verða gagnnýttir skilabest, og at so nógvir tilflytarar sum møguligt fáa so góða atkomu til undirvísing og eftirmeting sum møguligt.

§ 4 stk. 2
Sambært grein 4 stk. 2 skal undirvísing standa øllum í boði, sum eru fevnd av hesi løgtingslóg (ella aðrari løgtingslóg t.d. integratiónslóg ella útlendingalóggávu). Meginreglan er, at tað er ókeypis fyri næmingin at fylgja FSA-útbúgving, um næmingurin lýkur treytirnar í lóg og kunngerð.

Til tess at koma í samband við teir næmingar, sum eru fevndir av lógini, er samstarv við kommunurnar avgerandi, tá ið tað er kommunan, sum er myndugleikin, sum skrásetur, hvørjir borgarar búgva í kommununi.

Sambært hesi lóg verður tað uppgáva kommununar/kommunala samstarvsins at samstarva við málskúlastjóran og at tryggja, at hóskandi undirvísingarhøli eru til taks, at tey eru útgjørd so sum skúlastovur eiga at vera, so at undirvísing kann vera havd, og at lærarar hava hóskandi arbeiðsumstøður. Eitt nú, at vanlig talva og samvirkin talva, lærarask áp og atkoma til kaffistovu er tøk. Tað er ikki uppgávan hjá lokalu málskúlaleiðslunum at útvega undirvísingartilfar ella arbeiðsteldu til læraran.

Soleiðis hevur samstarvið verið fyriskipað higartil sambært frítíðarundirvísingarlóggávuni, og tað hevur virkað væl.

Verandi skipan sambært frítíðarundirvísingarlógini hevur heimilað landinum at veita eitt fíggjarligt ískoyti til lokalu kvøldskúlaleiðsluna á uml. 30 kr. pr. játtaðan tíma til undirvísing í føroyskum sum annaðmál.

Landsstýrismaðurin fær sambært hesi lóg heimild at endurrinda kommunalu málskúlaleiðsluni upp til 8 % av lønini, sum verður útgoldin til undirvísing í føroyskum sum

annaðmál á kommunala málskúlanum fyri kommunala málskúlaleiðslu og at útvega undirvísingarhøli.

§ 4 stk. 3
Til tess at tryggja, at øll undirvísingartilboðini veita somu dygd og tænastu, hevur landsstýrismaðurin yvirumsjón við virkseminum, og skal málskúlastjórin vísa til landsstýrismannin í undirvísingarmálum. Hesa uppgávu kann landsstýrimaðurin røkja við at fyriskipa regluliga uttanhýsis eftirmeting av virksemi Málskúlans.

**Til § 5**
Landsstýrismaðurin setir í starv málskúlastjóra at taka sær av yvirskipaðu fakligu, námsfrøðiligu, fíggjarligu og samskipandi uppgávunum fyri undirvísing sambært hesi løgtingslóg.
Í kunngerð, sum landsstýrismaðurin lýsir við heimild í hesari lóg, verða nærri ásetingar orðaðar um uppgávur málskúlastjórans.

Málskúlin fyri føroyskt sum annaðmál er sjálvstøðugur stovnur, sum er undir málsræði landsstýrismansins í undirvísingarmálum, og málskúlastjórin hevur dagligu leiðsluna av skúlanum, av samstarvinum millum skúlan og kommunur og av øllum øðrum samstarvi við undirvísingarmyndugleikar og útlendingamyndugleikar, Próvstovu og aðrar viðkomandi undirvísingarstovnar.

Málskúlastjórin verður staðsettur í Undirvísingarstýrinum, men skal røkja regluligt samband og samstarv við allar málskúlaeindirnar í landinum.

§ 5, Stk. 2.
Málskúlastjórin skal hava útbúgving innan annaðmál og skal antin hava nomið sær, ella fara undir at nema sær, góðkenda leiðsluútbúgving.

**Til § 6**
Landsstýrismaðurin skipar í samstarvi við kommunala geiran fyri, at kommunalir málskúlar verða skipaðir í kommununum í Føroyum, og at kommunalar málskúlaleiðslur virka. Við gildiskomu lógarinnar skulu í minsta lagi tríggir lokalir málsskúlar verða skipaðir, sum veita FSA- ndirvísing og FSA-útbúgving. Mælt verður til, at vit ikki fara upp um fýra tað fyrstu tíðina. Sum frá líður samráðast málskúlastjórin, kommunur og landsstýrismaðurin um hóskandi tal av kommunalum málskúlaeindum í Føroyum.

Tá málskúlastjórin er settur í starv, verður fyrsta uppgávan hjá hesum at skipa samstarvið við kommunalu málskúlaleiðslurnar og á tann hátt tryggja, at øll øki í landinum eru fevnd av einari málskúlaskipan.

*§ 6, Stk. 2.*
Kommunali málskúlaleiðarin kann vera leiðarin av kommunalu kvøldskúlaskipanini. Vegna tess at uppgávur hjá kommunalu málskúlaleiðslunum ikki verða so umfatandi, sum tær eru nú, verður mett, at tann kommunala málskúlaleiðslan væl kann vera tann sama sum tann kommunala kvøldskúlaleiðslan, tó so, at har sum kommunalt samstarv verður, skal kommunala samstarvið gera av, hvør átekur sær málskúlaleiðsluna og boða landsstýrismanninum og málskúlastjóranum frá hesum.

*§ 6, Stk. 3.*
Kommunali málskúlaleiðarin samskipar saman við málskúlastjóranum leiðreglur viðvíkjandi upptøku, virksemi, undirvísingaramboðum o.ø. í kommunala málskúlanum.

Hugsað verður um at samskipa kunningartilfar og kunnandi átøk um útbúgvingarmøguleikar tilflytarans í økinum. Og at henda kunning er í samsvari við yvirskipaður ætlanir málskúlastjórans.
Eisini skulu partarnir semjast um tørv á undirvísingarhølum, og hvussu umfatandi virksemið verður hvørja lestrarhálvu.

**Til § 7**
Málskúlastjórin setir og loysir úr starvi lærarar í samráð við kommunalu málskúlaleiðslurnar. Lærarar hava, hvat viðvíkur undirvísingarliga, námsfrøðiliga og fakliga virkseminum, tilvísing til málskúlastjóran.

*§ 7 Stk. 2.*
Alt landið er at rokna sum eitt setanarøki.

*§ 7, Stk. 2.*
Lærarar í Málskúlanum skulu hava neyðugu fakligu og námsfrøðiligu førleikarnar til at undirvísa í føroyskum sum annaðmál.

*§ 7 Stk. 3.*
Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um førleikakrøv og útbúgvingarkrøv sambært stk. 2.

Lærari, sum verður settur í starv í Málskúlanum, skal kunna tola at undirvísa innan fleiri kommunalar málskúlaeindir. Málskúlastjórin skal í samstarvi við kommunalu málskúlaleiðslurnar miða ímóti, at arbeiðsstað og bústaður lærarans verður so væl samskipað sum yvirhøvur møguligt. Málskúlastjórin hevur ábyrgd av at fyriskipa námsfrøðilig og faklig mennandi átøk, sum tryggja, at lærarar megna at undirvísa sambært námsætlan og sambært teimum avbjóðingum, sum standast av skiftandi tali av næmingum og tjóðskapum eins og í samsvari við galdandi reglur á útlendingaøkinum í landinum.

Landsstýrismaðurin ásetur førleikakrøv lærarans í kunngerð, og skal eftir tørvi saman við málskúlastjóranum fyriskipa neyðuga eftirútbúgving fyri lærarum, sum undirvísa í Málskúlanum fyri tilflytarar.

§ 7, Stk 3.
Í kunngerðini, sum landsstýrismaðurin lýsir, verða neyvari reglur ásettar um førleikakrøv til lærarar í Málskúlanum fyri tilflytarar.

**Til § 8**
Málskúlaskipanin verður fíggjað soleiðis, at landið rindar løn til málskúlastjóra og skrivstovuhald, umframt løn og ferðaendurgjald til lærarar á lokalu málskúlunum. Málskúlastjórin umsitur og avgreiðir lønir til lærarar í málskúlanum.

*§ 8, Stk. 2 og 3*

Kommunan lønar kommunala málskúlaleiðaranum og øðrum starvsfólkum, sum kommunan setur í starv við kommunala málskúlan fyri tilflytarar.

Tó kann landsstýrismaðurin veita lønarískoyti til lokalu málskúlaleiðsluna upp til 8% av teirri løn, sum verður útgoldin á kommunala málskúlanum til undirvísing í føroyskum sum annaðmál.

Henda skipan kann samanberast við ta skipan, sum er galdandi í dag, har endurgjald verður veitt fyri lokala kvøldskúlaleiðslu á 29.5 kr. pr. játtaðan undirvísingartíma í føroyskum sum annaðmál, og sum verður havdur í játtanartíðarskeiðnum.

Í 2023 verður metta útreiðslan av hesum lønarískoyti til kommunalu kvøldskúlaleiðslunar, sum umsita undirvísingina í føroyskum sum annaðmál kring landið mett at vera umleið 220.000 kr.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið metir, at ein landsumfatandi málskúlaskipan hevur tørv á umleið 7 ársverkum til undirvísingar og á hálvumøðrum ársverki til leiðslu. Rakstur, stig- og støðuroyndir lestrarvegleiðing o.a.

Tilsamans 8,5 ársverk. Harumframt verður tørvur á einari játtan til endurgjald til kommunalar málskúlaeindir og játtan til framleiðslu av undirvísingartilfari og próvtilfari.

*§ 8, Stk. 4.*
Kommunan ella kommunala samstarvið útvegar lokalu málskúlunum hóskandi høli og undirvísingaramboð. Um tørvur er á tí, kann kommuna gera avtalu við landsstýrismannin um undirvísingarhøli, sum landið ræður yvir.

Hetta er sama skipan sum er galdandi í løtuni, har undirvísingin í føroyskum sum annaðmál er skipað sum serstøk frítíðarundirvísing. Kommunurnar bjóða í dag skeiðini út og skipa fyri undirvísingarhølum og amboðum.

Lagt verður afturat, at kommunan kann gera avtalu við landsstýrismannin um undirvísingarhøli, sum landið ræður yvir. Her verður hugsað um til dømis miðnámsskúlarnar kring landið, sum kundu lagt undirvísingarhøli til virksemi, um tørvur er á tí.

Hóskandi undirvísingarhøli fevna um skúlastovu við neyðugum innbúgvi (borð og stólum) eins og samvirkna talvu og vanliga talva, internetsamband, ljós og hita og góða atkomu og arbeiðsumstøður fyri næmingar og undirvísarar. Kommunali myndugleikin skal ikki útvega málskúlanum undirvísingartilfar til næmingar ella arbeiðsteldu til undirvísarar. Tað er ein uppgáva, sum málskúlin hevur ábyrgd av.

**Til § 9**
Málskúlin kann krevja gjald fyri undirvísingartilfar (bøkur o.a.), samsvarandi reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir. Málskúlin kann taka gjald fyri undirvísing og/ella stig- og støðuroynd, um næmingur hevur verið innskrivaður til FSA útbúgving í meira enn fimm ár, og enn ikki er komin ígjøgnum FSA útbúgvingina. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur fyri hesa heimild at taka gjald frá næmingum, sum hava brúkt sín møguleika fyri ókeypis undirvísingartilboð í FSA-útbúgving í fimm ár. Hesar reglur verða ásettar í kunngerð.

§ 9. Stk 2.
Í samstarvi við Málskúlan kann kommunan í kommunala málskúlanum umsita gjaldið fyri undirvísingartilfar, sum næmingarnir skulu gjalda.

Málskúlin og næmingar hava tørv á undirvísingartilfari fyri at megna undirvísingina og útbúgvingina. Nógv av hesum verður framleitt lokalt í kommunala málskúlanum, vegna tess at tað ikki er nóg mikið av útgivnum ella digitalum undirvísingartilfari tøkt til føroyskt sum annaðmál. Fyri tílíkt undirvísingartilfar, sum verður framleitt og margfaldað til næmingarnar, kann málskúlin taka gjald – til kostprís. Í kunngerð verður ásett, hvussu høgt gjaldið í mesta lagi kann vera. Málskúlin og lokali málskúlin samstarva um hesa uppgávu.

**Til § 10**
At vera málskúlastjóranum til hjálpar at samskipa málundirvísingina í føroyskum sum annaðmál verður skipað ein nevnd. Í nevndini sita kommunalu málskúlaleiðararnir og málskúlastjórin, sum er formaður í nevndini.
Hóast virksemið hjá nýggja málskúlanum og kommunalu málskúlunum byggir á herðarnar á arbeiðið, sum kommunalu kvøldskúlarnir hava fyrisitið í nógv ár, so verður virksemið í nýggja málskúlanum væntandi meira og miðar eftir at lúka royndarkrøv, eins og at Málskúlin kann fyriskipa annað útbúgvingarvirksemi fyri tilflytarar, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál. Í fyrireiking, planlegging og eftirmeting verður mett skilagott, at málskúlastjórin og kommunalu málskúlaleiðararnir hava eitt skipað samstarv.
Í kunngerð verður nærri ásett, hvussu vavið av hesum samstarvi eigur at vera.

**Til § 11 og § 12**
Fyrisitingarlig avgerð, ið málskúlastjórin hevur tikið, kann kærast til landsstýrismannin. Kærufreistin er 4 vikur eftir, at kærarin hevur móttikið avgerðina. Kæran skal vera skrivlig og grundgivin.

Fyrisitingarlig avgerð er í hesum høpi t.d. avgerðir í starvsfólkamálum, avgerðir um upptøku og innskriving á útbúgvingina, og avgerðir sambært lestrar- og skilhaldsreglum Málskúlans.

**Til § 13**
Námsfrøðiligar avgerðir, ið málskúlastjórin tekur, kunnu kærast til landsstýrismannin innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur móttikið avgerðina. Námsfrøðiligar avgerðir eru t.d. niðurstøðan hjá málskúlastjóranum í einari kæru um próvtøku, endurroynd, umdøming o.a. At kærumøguleikin er avmarkaður til *rættarligar spurningar*, merkir, at landsstýrismaðurin eftirkannar, um ásetingarnar í løgtingslógini, umframt viðkomandi fyrisitingarrættarligar meginreglur eru hildnar, men at landsstýrismaðurin hinvegin ikki tekur støðu til serligar fakligar metingar, ið lærari og próvdómari hava gjørt, t.d. um ein næmingur hevur staðið eina próvtøku ella ikki.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur viðvíkjandi kærum í námsfrøðiligum málum. Í hesum sambandi skal havast í huga, at hóast freistin at kæra avgerðina hjá málsskúlastjóranum til landsstýrismannin er 4 vikur eftir, at kærarin hevur móttikið avgerðina, so kann landsstýrismaðurin áseta eina styttri freist at lata málskúlastjóranum upprunaligu kæruna um t.d. próvtøku. Til dømis kann landsstýrismaðurin áseta, at freistin at lata

málsskúlastjóranum kæruna er 7 dagar eftir, at próvtøkuúrslitið er kunngjørt næminginum, og er hetta grundgivið við, at tað er umráðandi, at próvtøkugongdin ikki er farin úr minninum á próvhoyrara og próvdómara, sum skulu grundgeva fyri, hví ein próvtøka er staðin ella ikki staðin.

Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, í hvønn mun og undir hvørjum treytum málskúlastjórin kann bjóða næmingi endurroynd ella umdøming. Hetta skal skiljast í tí samanhangi, at málsskúlastjórin, sum ikki sjálvur hevur verið til staðar til próvtøkuna, ikki kann gera av at broyta úrslitið, sum próvhoyrari og próvdómari eru komnir til. Landsstýrismaðurin kann í hesum sambandi áseta, at úrslitið frá endurroyndini ella umdømingini er endaligt.

**Til § 14**
Miðað verður ímóti, at henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024. Tørvur er á meira skipaðum kørmum fyri tí skjótt vaksandi útbúgvingarvirkseminum, sum verður bjóðað borgarum, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál. Lærarar, sum starvast innan skipanina, hava tørv á tryggum setanarviðurskiftum, og at starvsrættarlig viðurskifti verða skipað sum á øðrum útbúgvingarstovnum.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, dagfesting.

**Djóni Nolsøe Joensen**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Uppskot til kunngerð um málskúla og undirvísing
Fylgiskjal 2: Námsætlan
Fylgiskjal 3: Leiðbeining til undirvísng í føroyskum sum annaðmál
Fylgiskjal 4: Leiðbeining til próvtøkuhald